Kjak

Dagfinnur Danbjørg

Harra fíggjarmála-ráðharri: 60 milliardir

Fíggjarmálaráðharrin var skjótur at samanlíkna Eik´s ávirkan av føroyska samfelagnum og javnseta hana við við ávirkanina av Den Danske Bank og Nordea í Danmørk. Og tað var uttan iva fyrsta fyrireiking av at fáa fólkið at eta komandi kamelarnir og lata upp til 600 lántar mill. kr. - úr landskassanum, ið eftir fíggjarmálaharrans mátistokki svara til 60 milliardir danskar krónur úr danska statskassanum til nevndu tveir donsku bankarnir, men hesa samanbering fer hann helst ikki at gera, tí hon tænir ikki endamálinum.

Sjúkrahús, skúlar, bústovnar, pensionistar, sálarsjúk o.o.treingjandi hava staðið fyri skotum leingi, tí tey vera søgd at vera ov dý fyri landskassar. Lønmóttakarar vera kravdir eftir lønarsteðgi, meðan skattir og avgjøld vera sett upp, samstundis sum tað frammanundan er nógv dýrari at liva í Føroyum enn í Danmark, sjálvt um Danmark telist millum tey dýrastu londini at liva í.

Alt hetta og meira, ið eg kann venda aftur til, meðan báðir stjórarnir fáa uml. 7,5 mill. kr. sum fráfaringarheilsan fyri góða og trúgva tænastu út av eggini svarar til eina samlaða lønmóttakaraløn yvir 25 ár. Stik den.

Harra fíggjarmálaráðharri! Lætt er at rista breiðar reimar áannan mans húð, alt meðan tey seku, ið hava skúma fløtan og framhaldandi ætla, at so skal vera, telja mill. upp úr felagskassanum við tínum vælsignilsi til nýggj ævintýr. Eg trúi, at tú hevði lært av 90'unum, har fyrst og fremst tey áðurnevndu bóru byrðarnar, meðan tey seku gingu frí. Men at síggja til, so hevur tú einki lært og einki gloymt. Alt er status quo. Tey privatu skúma fløtan, gjalda tann skatt teimum lystir og brúka landskassan sum sparigrís tá á stendur.

Harra fíggjarmálaráðharri! Kanningar vísa at alt fleiri venda tær og tínum sokallaða arbeiðaraflokki bakið, tí tey hava funnið út av, at lítil og eingin samanhangur er millum orð og gerðir. So áðrenn eingin sær mun á tær og Jørgin, so átti tú kanska at hugt í spegli og mint teg á, hvat tann flokkur, ið hevur borðið teg til valdið, eigur at standa fyri bæði tá tað er silvitni, men sanniliga eisini, tá ið brýtur í bæði borð og so sett kós hareftir

Livandi síl svimja móti streyminum. Deyð reka undan.

Annika Olsen
Landsstýriskivnna í innlendismálum

Fremstifingur átti at vent inneftir

Síggi í blaðgrein at fyrrverandi vinnumálaráðharrin hevur fremstafingur á lofti mótvegis innlendismálaráðum viðvíkjandi prinsippum um almen útboð. Lætt er at hava fingrar á lofti, men tað hevði verið meiri hóskiligt, at fyrrverandi vinnumálaráðharrin, nú løgtingskvinnan Bjørt Samuelsen hevði tikið í egnan barm og greitt frá, hví hon ikki raðfesti at seta arbeiðið í gongd við at smíða lóggávu um almen útboð. Sitandi vinnumálaráðharri hevur nú sett hetta arbeiðið í gongd, sum væntandi verður liðugt innan stutta tíð, soleiðis at vit fáa lógaráett krøv hesum viðvíkjandi. Eftirsum vit enn, ikki hava nakra lóg um almen útboð, so hevur Innlendismálaráðið latið gjørt reglugerð fyri stovnin Landsverk, sum stendur fyri stórum pørtum av almennu íløgunum, har reglur verða settar til stovnin um, at alt arbeiði, sum stovnurin stendur fyri skal bjóðast út í almennum útboði, bæði hvat viðvíkur projektering og sjálva byggingina. Hendan reglugerðin verður væntandi sett í gildi innan stutta tíð, eftir at hon hevur verið til hoyringar hjá vinnuni.

Hvat viðvíkur Skálafjarðartunlinum, so kennir Bjørt Samuelsen væl forsøgnuna til hesa verkætlan. Tað var longu í 2007, at Løgtingið samtykti, at samráðast skuldi við eitt ávíst partafelag og ikki fleiri partafeløg og somuleiðis stendur hetta eisini beinleiðis skrivað í samgonguskjalinum. Í lógaruppskotinum, ið varð samtykt í Tinginum í vár varð tó sett eitt evsta mark fyri, hvussu leingi hendan samráðingartilgongdin kundi verða við hetta ávísa partafelagið. Hetta evsata mark er 1. desembur í ár og um so er, at sáttmáli ikki er undirskrivaður við hetta felagið, verður heimilað landsstýrinum at bjóða uppgávuna at standa fyri hesari verkætlan út alment. Hetta má á ongan hátt skiljast sum, at projekteringin og byggiarbeiðið ikki verður bjóðað út við verandi, tað verður tað sjálvsagt.

Helgi Abrahamsen
løgtingsmaður

Helvtin av skattinum er til onga nyttu

Sambært Tjóðveldi, fær tað ongan týdning fyri landskassan, um skatturin lækkar við 50 prosentum

Hetta ljóðar sum skemt, og tað er eisini skemt. Annita á Fríðriksmørk endurtekur í eini blaðgrein, at blokkstuðulin er bara 5 prosent av føroyska búskapinum. Tað heldur hon vera sera lítið, tí har eru sum kunnugt heili 95 onnur prosent at taka av.

Men fyri at skera tað út í papp, so er "búskapurin" ikki tað sama sum "landskassin". Búskapurin (bruttotjóðarúrtøkan) er øll inntøkan hjá samfelagnum. Hvør króna, sum verður goldin fyri okkara framleiðslu, telur við, men tað er so grúvuliga langt ífrá, at allar hesar krónurnar enda í landskassanum.

Inntøkurnar hjá landskassanum eru bara ein triðingur av bruttotjóðarúrtøkuni. Taka vit so ein einstakan part av inntøkunum og rokna hann sum prosent av øllum búskapinum, so verður talið sjálvandi ógvuliga lítið. Og júst hesum ger Tjóðveldi sær dælt av, tá tey skulu greiða frá sínum politikki.

Allar krónur telja líka nógv

Tá Annita á Fríðriksmørk, í 1998, bleiv politikari og byrjaði at tosa um, hvussu óneyðugur blokkstuðulin var, tá var blokkstuðulin næstan líka stórur sum skattainntøkurnar hjá landskassanum. Hvussu heldur Annita at tað hevði ljóðað, um hon til dømis tá hevði sagt, at nú skuldu føroyingar gevast við at gjalda skatt, tí landskassin hevði ikki brúk fyri pengunum (teir vóru jú bara nøkur fá prosent av samlaða búskapinum)? Sjálvandi segði hon ikki tað, hóast hon bæði tá og nú sigur nakað tað sama um blokkin.

Og eitt afturat: Flestu pengarnir, sum ikki verða kravdir inn í skatti, verða vanliga brúktir í føroyska samfelagnum, og tí koma teir (bara nakað seinkaðir) í landskassan millum annað sum meirvirðisgjald. Men pengar, sum landskassin missir, tá blokkstuðulin lækkar, koma als ikki inn í føroyska samfelagið og heldur ikki í landskassan.

So tá summi siga, at landskassin ikki hevur brúk fyri blokkstuðlinum, so er tað líka ørt sum at siga, at helvtin av øllum skattinum, sum føroyingar gjalda til landskassan, er til onga nyttu.